# Havnin tók gullið

**Í finaludystinum eydnaðist tað havnarmonnum at vinna á klaksvíkingum og harvið gerast føroyameistarar**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



Støðan var 2-1 til havnarmenn ímóti oddaliðnum úr Klaksvík. Kravið varð 3-1, um FM-heitið skuldi fara til Havnar. Martin Poulsen og Ólavur Simonsen sótu eftir á fyrsta borði og stríddust fyri hvørt sítt lið. Martin hevði fyrimun í talvinum, men hervilig tíðarneyð argaði báðar telvarar. Ein rúgvismikil kjøtrond kringsetti hendan gýsara, ið endaði við, at Ólavur akkurát ikki náddi at leika sín leik nr. 40 og tapti tí talvið uppá tíð. Tískil vunnu Martin og Havnar Telvingarfelag føroyameistaraskapin 2005.

Sæð við uttanveltaðum brillum, kundi eingin ynskja sær ein betri kappingarenda enn tann í Argja skúla leygardagin. Meira spennandi gerst tað ikki.

Tað má sjálvsagt tykjast tungt hjá klaksvíkingum, sum síðani fyrsta umfar høvdu havt leiðsluna við tryggari og nærum ósvikaligari telving. Í seinni helvt høvdu klaksvíkingar Heina Olsen á liðnum, men hann luttekur í løtuni saman við Flóvini Tór Næs í einari IM-kapping í Dionulund á Sælandi, og varð tí ikki tøkur at veita eina hjálpandi hond á seinasta leikdegi.

Eftir eina óstøðuga kappingarbyrjan, bygdi havnarliðið seg spakuliga upp og fóru av álvara at hótta tað annars suvirena oddaliðið, KTF. Undan seinastu tveimum umførunum, høvdu klaksvíkingar eina leiðslu uppá hálvttriðja stig, men tað varð kortini ikki nóg mikið. Havnarmenn vístu format í endaspurtinum.

Manningin við topptelvarunum Martin Poulsen og Olaf Berg á ovaru borðunum og tí roynda Boga Ziska og evnaríka Helga Dam Ziska á aftaru borðunum, varð ein optimal blanding eitt lið kann ynskja sær.

### Uppgerðin um toppskoraraheitið

Helgi Dam Ziska og Wille Olsen leiktu ein skjótan javnleik á 4. borði. Einki stórvegis hendi í tí talvinum og støðan var mest sum læst, tá friðarsemjan varð undirskrivað. Eisini Bogi Ziska og Rani Nolsøe leikti ein relativan skjótan javnleik á 3. borði.

Olaf Berg og Finnbjørn Vang høvdu ikki bert føroyameistaraskapin at berjast fyri, men eisini ein innanhýsis dyst um heiðurin at gerast toppskorari. Undan seinasta umfari var Finnbjørn toppskorari við 8,5 stigum, meðan Olaf hevði skavað eins imponerandi 8 stig saman. Olaf gjørdi bart og vann talvið, sum er við í blaðnum, og gjørdist tí toppskorari í 1. deild. Samstundis legði Olaf FM-lagnuna í hendur Martins, sum jú loksins vann talvið ímóti Ólavi Simonsen.

Martin hevur sum oddamaður á havnarliðnum í ár fingið sera góð úrslit. Eitt nú tapti hann einki talv, og hann vann báðar uppgerðirnar móti vinmanninum Hans Kristian Simonsen.

Apropos Hans Kristian, so hevði hann eitt skuffandi kappingarár við 4,5 stigum av 10 møguligum á Kollfjarðaliðnum. Eisini gekst illa í hond hjá Ólavi Simonsen, sum hevði sítt higartil nógv ringasta úrslit í liðkappingini við 4,5 stigum av 9. Óhoyrt er, at Ólavur tapur fýra talv við hvítu fólkunum í somu kapping.

### Toftamenn flyta niður

Isoleraðir í botninum vórðu toftamenn. Jens Kristian Hansen var burturstaddur alt kappingarárið og hetta ávirkaði sjálvandi úrslitini hjá toftamonnum í ár. Í løtuni megna teir als ikki uppgávuna í 1. deild, og tí eru teir neyvan serliga keddir av at flyta niður.

Hvalvíkingar vunnu bronsuna, hóast vestmenningar vunnu stórsigur á teimum í seinasta umfarinum. Nevnast skal, at bæði Finnbjørn Zachariassen og Martin Brekká vantaðu á liðnum í dystinum ímóti vestmenningum. Rógvi W. Rasmussen mátti lúta á fyrsta sinni ár, tá hann tapti ímóti John Rødgaard.

### Tvey klaksvíkslið í 1. deild

Komandi kappingarár vera tvey lið úr Klaksvíkar Talvfelag í 1. deild. Klaksvíksliðið í 2. deild vann trygt á kollfirðingum og sandavágsmenn fingu ein ordans lúsing móti Havnini A, 0-4 (Haldur Suni Johansen vann á Torkil Nielsen). Tískil vunnu klaksvíkingar deildina við hálvumøðrum stigi niður til havnarliðið. Gøtumenn vunnu 3. deild í harðari kapping við havnarmenn og vestmenningar. Gøtumenn verða tí aftur at síggja í næstfremstu deildini komandi kappingarár.

Klaksvíkingar vunnu sum væntað unglingadeildina, tá teir vunnu á nærmastu kappingarneytunum úr Sandavági á seinasta leikdegi.

Hóast felagið ikki vann 1. deild, kann Klaksvíkar Talvfelag fegnast yvir góð úrslit í kappingarárinum 2004/2005.

## Talvið hesa vikuna

Olaf Berg (2222) - Finnbjørn Vang (2059)
1. deild (10. umfar) 12.02.2005

1.d4 d5 2.c4 e6 3.cxd5 exd5 4.Ric3 Rif6 5.Bg5 Be7 6.Rif3 0—0 7.e3 Be6 8.Bd3 Ribd7 9.h3 Re8 10.0—0 c5 11.Rc1 h6 12.Bf4 c4 13.Bb1 a6 Svartur kann ikki klaga um byrjanarspælið. Støðan tykist rættiliga jøvn 14.Rie5 Rc8 15.Bh2 Rixe5? Óneyðugt. b5 er væl betur. Nú fær hvítur lættari spæl og álop 16.dxe5 Rih7 17.Fc2 Rif8 18.Rcd1 b5 19.Rie2 Møguligt var at leika Rixd5 og síðani e4, men Olaf valdi aðrar vegir 19...Bc5 20.Rid4 Fg5 Nú biðjur Finnbjørn um ein finnustorm... 21.f4 Fh5 22.f5 Sjálvandi, pust the pawn! 22...Bd7 23.Rf3 Svartur er í trongum skóm, ringt er at finna ein góðan leik. 23...Bc6 Men hetta var nú ikki sterkasti leikur. b4 var ein betur roynd 24.Rixc6 Rxc6 25.Rxd5 f6 26.Fe4! Ein sentraliserað frúgv, ið stendur trygt og sum samstundis er álopssinnað 26...Rih7 27.Rd7! Rcc8 28.Fb7 g4 hevði fangað frúnna innan fáar leikir, men Fb7 vinnur eisini 28...Rig5 29.Rxg7+ Kf8 30.exf6 Nú er støðan fullkomiliga tapt hjá Finnbirni, men sum Olaf segði eftir talvið, so hevði talvið nógv at siga og skilti tí væl at Finnbjørn helt fram 30...Rixf3+ 31.gxf3 Bxe3+ 32.Kg2 Bc5



Støðumynd eftir 23...Bc5

33.Rg8+! Kxg8 34.Fg7 skák mát. Gott telvað av Olaf. 1—0

### Føroyameistarar seinastu 10 árini

1996: Klaksvík
1997: Klaksvík
1998: Kollafjørður
1999: Klaksvík
2000: Havnin
2001: Havnin
2002: Vestmanna
2003: Havnin
2004: Klaksvík
2005: Havnin

## Úrslit og endaligar støður

**1.deild**
**10. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| Havnin | Klaksvík | 3-1 |
| Martin Poulsen | Ólavur Simonsen | 1-0 |
| Olaf Berg | Finnbjørn Vang | 1-0 |
| Bogi Ziska | Rani Nolsøe | 0,5-0,5 |
| Helgi D. Ziska | Wille Olsen | 0,5-0,5 |
| **Kollafjørður** | **Toftir** | **3-1** |
| Hans Kr. Simonsen | Andreas Andreasen | 0,5-0,5 |
| Bernhard Thomsen | Helgi Joensen | 1-0 |
| Jón Olsen | Jústinus Hansen | 0,5-0,5 |
| Margeir Zachariassen | Oddmar Andreasen | 1-0 |
| **Hvalvík** | **Vestmanna** | **0,5-3,5** |
| Rógvi W. Rasmussen | John Rødgaard | 0-1 |
| Sámal Christiansen | Jákup á Rógvi Andreasen | 0,5-0,5 |
| Gunnar Joensen | Samson Højgaard | 0-1 |
| Kári Petersen | John Jacobsen | 0-1 |

**Endaliga støðan**

| | |
|---|---|
| 1. Havnin | 28,5 |
| 2. Klaksvík | 28,0 |
| 3. Hvalvík | 20,5 |
| 4. Vestmanna | 18,5 |
| 5. Kollafjørður | 17,0 |
| 6. Toftir | 6,5 |

**2. deild**
**10. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| Sandavágur | Havnin a | 0-4 |
| Kollafjørður | Klaksvík | 0,5-3,5 |
| Havnin b | Vestmanna | 3-1 |

**Endaliga støðan**

| | |
|---|---|
| 1. Klaksvík | 29,5 |
| 2. Havnin a | 28,0 |
| 3. Sandavágur | 24,5 |
| 4. Havnin b | 14,0 |
| 5. Vestmanna | 13,5 |
| 6. Kollafjørður | 7,5 |

**3. deild**

| | |
|---|---|
| 1. Gøta a | 31,5 |
| 2. Vestmanna a | 29,0 |
| 3. Havnin a | 28,0 |
| 4. Havnin b | 26,5 |
| 5. Sandavágur | 23,0 |
| 6. Rókur | 21,5 |
| 7. Klaksvík | 16,5 |
| 8. Eiði | 15,0 |
| 9. Vestmanna b | 10,0 |
| 10. Gøta b | 5,5 |

**Unglingar**
**Endaliga støðan**

| | |
|---|---|
| 1. Klaksvík | 24,5 |
| 2. Sandavágur | 22,0 |
| 3. Havnin | 14,0 |
| 4. Gøta | 13,5 |
| 5. Miðvágur a | 12,0 |
| 6. Rókur | 10,0 |
| 7. Vestmanna | 9,5 |
| 8. Miðvágur b | 1,5 |

**Toppskoraralistin í 1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 1 Olaf Berg | (HT) | 9,0/10 |
| 2 Finnbjørn Vang | (KTF) | 8,5/10 |
| 3 Rani Nolsøe | (KTF) | 7,0/8 |
| 4 Bogi Ziska | (HT) | 7,0/10 |
| 5 Martin Poulsen | (HT) | 6,5/9 |
| 6 John Rødgaard | (VT) | 6,0/9 |